**Journalnr.:** 1.01 - 2700605

# Mál- og avrikssáttmáli millum

## Landssjúkrahúsið

og

## Heilsumálaráðið

April 2011

J. C. SVABOSGØTA • FO-100 TÓRSHAVN
Telefon 30 45 00 • Telefax 31 42 53 • T-post: LSH@LSH.FO

# Avrikssáttmáli millum Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið fyri 2011

## 1. Inngangur

Hesin avrikssáttmáli er millum Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið. Sáttmálin fevnir ikki um vanligt afturvendandi virksemi, men er dentur lagdur á tey mál, sum Landssjúkrahúsið og Heilsumálaráðið hava sett sær fyri at fremja í 2011, og sum serliga stuðla undir visjónina og/ella uppundir framtíðar menningina av Landssjúkrahúsinum.

### Landssjúkrahúsið er hornasteinurin undir Heilsuverkinum

Sum hornasteinurin undir Heilsuverkinum vil Landssjúkrahúsið:

- hava høgan fakligan førleika og gera eitt dygdargott arbeiði,
- fremja góða og samanhangandi sjúklingagongd,
- fáa úrslit gjøgnum áhuga, menning og yrkiskunnleika og
- vera eitt áhugavert arbeiðspláss, sum byggir á samrøður, samstarv, tryggleika og gott samskifti

| | |
|---|---|
| **Okkara missjón** | Landssjúkrahúsið veitir eina góða heilsutænastu á høgum fakligum støði. Vit menna og útbúgva okkara starvsfólk og stuðla undir gransking. |
| **Okkara visjón**<br><br>Tey 3 S'ini | **Sjúklingurin er í miðdeplinum**<br>Vit veita virðiliga, skjóta, góða og samanhangandi kanning, viðgerð, røkt og endurmenning í samstarvi við sjúklingin og tey, ið varða av.<br>**Starvsfólkini eru errin av at arbeiða her**<br>Vit kenna, at vit arbeiða á einum góðum arbeiðsplássi, ið veitir dygga og álítandi tænastu. Vit trívast í arbeiðsumhvørvinum og kenna, at okkara arbeiði verður virt og okkara førleikar gagnnýttir.<br>**Samfelagið fær ágóðan av okkara virksemi**<br>Landssjúkrahúsið er ein tænastudepil, sum allir borgarar í landinum kenna seg tryggar við at venda sær til og nýta. |
| **5 strategisk fokusøkir:** | |
| **Sjúklingur** | **1 Dygdin í sjúklingagongdini skal verða betri**<br>Sjúklingurin skal vera í miðdeplinum. Dygd skal vera í allari viðgerðini, tað er bæði fakliga dygdin og upplivda dygdin hjá sjúklinginum. Dentur skal verða lagdur á tørvin hjá tí einstaka sjúklinginum, tí tað er ein fortreyt fyri dyggari viðgerð, røkt og endurmenning, at sjúklingurin trívist. |
| **Starvsfólk** | **2 Starvsfólkini skulu vera væl útbúgvin og trívast**<br>Starvsfólkamenning skal tryggja høgt førleika- og útbúgvingarstig hjá starvsfólkunum. Trivnaður er ein fortreyt fyri nøgd starvsfólk. Dugnalig og nøgd starvsfólk hava góða ávirkan á sjúklingin og arbeiðsumhvørvið. Útbúgvingarstigið skal verða tryggjað við eftirútbúgving og førleikamenning. Nøgdsemi skal verða tryggjað við m.a. at bøta um fysisku karmarnar og arbeiðsumhvørvið, men eisini við at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða virdir og gagnnýttir. |
| **Samskifti** | **3 Samskiftið skal vera eitt virkið amboð** á øllum sjúkrahúsinum og skal tryggja høgt kunningarstig. Samskiftið við sjúkling og tey, ið varða av, er týðandi partur í eini sjúklingagongd. Gott samskifti skal stuðla undir gott samstarv millum starvsfólk. Samskiftið skal tryggja Landssjúkrahúsinum gott |

| | |
|---|---|
| | umdømi í samfelagnum sum heild. Sjúklingar, avvarðandi, almenningurin, fjølmiðlar og politikkarar fáa gagn av høgum kunningarstigi. |
| KT | **4 KT skal stuðla øllum arbeiði og mannagongdum**<br>KT er neyðugt grundarlag og amboð í heilsufakliga og umsitingarliga arbeiðinum á Landssjúkrahúsinum. Allar viðkomandi dátur skulu verða skrásettar – líka frá fíggjarligum upplýsingum og hagtølum, til kanningarúrslit og upplýsingar um viðgerðir. KT skal somuleiðis tryggja opinleika og høgt kunningarstig, við tað at sjúklingar, avvarðandi og samfelagið sum heild fáa mest møguligt innlit í virksemi Landssjúkrahúsins, samstundis sum persónsupplýsingarnir verða vardir. |
| Tilfeingi | **5 Alt tilfeingið skal brúkast munagott**<br>Við tilfeingi, verður hugsað um alt tilfeingið, ið stovnurin hevur – frá fíggjarligu játtanini til starvsfólk og mannagongdir. Virksemið á Landssjúkrahúsinum skal verða skipað og umsitið soleiðis, at alt tilfeingið verður gagnnýtt á besta hátt. Vitanin á Landssjúkrahúsinum skal verða tryggjað, og verandi skipanir og mannagongdir skulu áhaldandi verða mettar og bøttar. Hetta ger tað møguligt at arbeiða virknari umsitingarliga og fíggjarliga. Tænasturnar hjá Landssjúkrahúsinum skulu verða miðvísar og málrættaðar. |

Út frá visjónini og hesum 5 lýstu strategisku málunum, hevur Landssjúkrahúsið sett verkevni og mál, sum skulu fremjast í 2011. Talvan niðanfyri vísir, hvussu verkevnini í 2011 eru knýtt at teimum 5 strategisku málunum.

| | Verkevni | Mál 1 - Sjúkling | Mál 2 - Starvsfólk | Mál 3 - Samskifti | Mál 4 – KT | Mál 5 - Tilfeingið | Mál 2011 | HMR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1a) | 'Tann góða sjúklingargongdin' | X | X | X | X | X | Lýsa minst 4 nýggjar sjúklingagongdir<br>1) Persónmenskuólag<br>2) Hjartaforløb<br>3) Mammacancer<br>4) Knæ alloplastikk<br>Eftirmeting og uppfylging av verandi 6 sjúklingagongdunum | |
| 1 b) | Heimtøkur og uttanlandstænastan | X | X | X | | X | At lýsa upplagdar heimtøkur.<br>Gjøgnumføra hjartakanningar og heceptin/taxoterre | x |
| 2a) | Skipa eina HR- og menningardeild | X | X | X | X | X | Skipa deildina:<br>Arbeiðsøki, uppgávur, manning og organisering, herundir definera HR og HR ábyrgd á depils- og deildarstigi | |
| 2b) | Førleikamenning | X | X | | | X | Lýsa støðuna , so arbeiðið við at leggja yvirskipaða ætlan fyri førleikamenning kann byrja<br>Útbúgving:<br>Royndarkoyra LS-leiðaraútbúgving | |
| 2c) | Menningarsamrøður | X | X | X | | X | Eftirmeta 2010 og seta mál fyri 2011. 70% og fáa allar deildir í gongd | |
| 2d) | Gransking | X | X | | | X | Granskingarumhvørvið svørtu lon. Orða granskingarpolitikk. Stuðla undir tað sum er í gongd. Samstarv við aðrar granskingarstovnar | |
| 3 | Samskifti | | | X | | | Gera samskiftisstrategi fyri Landssjúkrahúsið | |
| 3a) | Betra kunningina til sjúklingar/avvarðandi | X | | X | | X | Gera ætlan fyri heimasíðun a og menna/dagføra kunningina til ymsu málbólkarnar:sj, kml, borgarar, fjølmiðlar<br>Kanna tørvin og framleiða tilfar/faldarar samsvarandi | |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | hesum | |
| 3b) | Styrkja samskiftið og samstarvið innanhýsis | | X | X | | X | Fyrireika APV saman við samstarvs- og trygdarnevnd | |
| 3c) | Styrkja samskiftið við kommunulæknar | X | X | X | X | X | 4 dialogfundir/evnisdag fyri serlæknar og kommunulæknar | |
| 4a) | KT-trygd | x | X | X | x | | KT-trygdin í fokus | x |
| 4b) | THS konsolidering | X | X | X | X | | Eftirmeta/Raðfesta - tillaga og undirvísa | X |
| 4c) | MADS-mikrobilogisk skipan | x | X | X | x | | Er keypt og skal implementerast | x |
| 4d) | Patologiskipan | x | X | X | x | | Fyrireiking | X |
| 4e) | Fleiri skipanir í THS og dagføringar | x | x | X | x | | EKG, SMS-boðtænasta, digital diktering | X |
| 5a) | Hagtøl /CI | X | X | X | X | X | Heilsufrøðilig virksemishagtøl leggjast út til leiðslur og í størri mun nýtast sum leiðslu- og stýringsamboð | X |
| 5b) | Neyvari skráseting og upplýsing um virksemishagtøl | x | | | x | X | CI | x |
| 5c) | Betri samanhang millum fíggjarstýring og virksemisstýring | | | X | X | X | Dialogfundir við depilsleiðslur Álítandi innanh. Hagtøl Menna leiðsukunningarportal | X |

Krossarnir eru settir í mun til, hvussu verkevnini (ella málini) ávirka tey 5 strategisku fokusøkini. Verkevni 1a) 'Tann góða sjúklingagongdin' ávirkar øll 5 strategisku fokusøkini, tó mest sjúklingagongdina og samskiftið, fokusøkini 1 og 3, har krossarnir eru merktir við feitari skrift. Verkevni 1b) 'Heimtøkur og Uttanlandsskrivstova', ávirka serliga strategisku málini 1,2,3 og 5, eini betri sjúklingagongd (1), møguleika fyri kanning og viðgerð í Føroyum, sum eisini gevur størri fakligar avbjóðingar, betri samskifti (3) og møguleika fyri útveksling av okkara starvsfólki (2). Í mun til arbeiðsgongdirnar í dag, so er hetta eisini ein bíligari og betri loysn, og harvið verður tilfeingið betri gagnnýtt (5).

## Serlig fokusøki í 2011 - 'Menning og samskifti'

Stjórnin hevur avgjørt, at "Menning og samskifti" skulu vera serligu átaksøkini fyri 2010/2011, sum eisini verkevnini í sáttmálanum í stóran mun lýsa.

Í sjúklinganøgdsemiskanningini frá 2010 fekk Landssjúkrahúsið rímuliga góð skoðsmál. Tó er kunning til sjúklingin eitt øki, sum arbeiðast skal við. Eitt nú beinleiðis samskifti við sjúklingin, betri skriftlig kunning og viðkomandi, dagførdar faldarar til sjúklingar og avvarðandi.

Í 2010/11 er ætlanin at arbeiða meiri miðvíst á menningarøkinum, m.a. við at skipa eina HR-menningardeild, sum fevnir um starvsfólkamenning, organisatiónsmenning og samskifti. Sum dømi um virksemi kann nevnast íverksetan av LS-leiðaraútbúgving, framhald av menningarsamrøðum, og fyrireiking til, at deplar og deildir gera ætlanir og seta mál fyri egnari menning og egnum virksemi (avrik).

Stór menning er farin fram á Landssjúkrahúsinum seinastu árini og verkætlanir so sum THS-verksetingin fer nú í aðrar fasur, meðan aðrar verkætlanir byrja, t.d. integratión við MADS-mikrobiologisk skipanina og sms-boðtænastan í THS. Orka skal leggjast í at hækka kvalitetin av tí sum verður skrásett. Fyrireikingar til patologiskipan skulu fremjast.

**Den Danske Kvalitetsmodel (DDKM)**
Heilsumálaráðið hevur tikið stig til at Heilsuverkið skal arbeiða eftir 'Den Danske Kvalitesmodel' DDKM . Ein lýsing av hesum arbeiðinum skal gerast í 2011 og er leikluturin hjá Landssjúkrahúsinum at fyrireika organisatiónina uppá hvussu DDKM kann nýtast sum grundarlag fyri virkseminum á Landssjúkrahúsinum. Týdningamikið er at fáa staðfest hvønn yvirskipaðan leiklut LS hevur og hvat hetta arbeiðið ítøkiliga inniber á depils- og deildarniveau.

Enn er ikki komið á mál við skráseting av 'utilsigtede hændelser'. Hetta arbeiði skal gerast sum partur av DDKM arbeiðinum í 2011 og 2012.

## 1. Betri sjúklingagongdir

**1a) Verkseting og lýsing av tí góðu sjúklingagongdini**
Landssjúkrahúsið er til fyri sjúklingin. Hetta er aðalmálið í øllum virksemi á stovninum. Tað er avgerandi, at sjúklingar, sum koma í samband við sjúkrahúsið, kenna, at teir verða settir í miðdepilin, og at teirra sjúklingagongd er eyðkend av góðari ráðlegging, góðum samskifti og fakligari dygd.

'Tann góða sjúklingagongdin' var fokusøkið í 2009. Tá varð funnið fram til hóskandi frymil at arbeiða við. Í 2010 vóru 6 sjúklingagongdir partvíst verksettar, sum lýstar vórðu í 2009/10.
Hesar eru:
1. Nýíkomin skizofreni
2. Miðalsvár depressión
3. Elektiv Parkinson
4. Apoplexia Cerebri
5. Mjadna alloplastik
6. Normala barnakonan

Ein eftirmeting av gongdini higartil skal gerast. Ynski er at hava sama kvalitetsnivea á sjúklingagongdunum og mál sum kunnu mátast mugu framyvir setast.

Miðað verður ímóti at lýsa fýra nýggjar sjúklingagongdir í 2011.Hesar sjúklingagongdir eru valdar:
1) Persónmenskuólag – Psyk øki
2) Hjartasjúka – Medisinskt øki
3) Mammacancer - Skurðøki
4) Knæ alloplastikk- Skurðøki

Í sjúklingagongdunum skal dentur leggjast á at kunna lýsa ábøtur, og at hesar mátast í hóskandi mátipunktum.

**1b) Heimtøkur og Uttanlandstænastan**
Viðgerðin á Landssjúkrahúsinum er partur í einari samlaðari sjúklingagongd. Ein partur av sjúklingum, verða eisini viðgjørdir uttanlands. Málið við at leggja allar funktiónir í eina Uttanlandstænastu er, at fáa eina effektivari og betri skipaða sjúklingagongd í samband við viðgerð uttanlands. Nú allar funktiónir í samband við viðgerð uttanlands eru miðsavnaðar í nýggju Uttanlandstænastuni, hevur Landssjúkrahúsið ætlanir um at lýsa hesar sjúklingagongd(ir).

At lýsa møguligar og upplagdar heimtøkur er framvegis viðkomandi og verður tikið við í ætlanunum fyri 2011.

| Avrikskrøv: Betri sjúklingagongd | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | Betri sjúklingagongdir | |
| Virksemi | a)Framhaldandi verkseta tær 6 sjúklingagongdirnar, sum lýstar vóru í fjør.<br>Velja 4 nýggjar sjúklingagongdir – lýsa, optimera og gera verksetanarætlan fyri hesar.<br>b)Lýsa møguleikan fyri heimtøkum á øllum sergreinum.<br>c) Velja og lýsa uttanlands-sjúklingagongd | 2010/11<br><br>2011/12<br><br>2011<br><br>2011 |

## 2. Førleikamenning

Í 2011 er ætlanin at seta fokus á menning og at arbeiða við hesum í mun til einstaka starvsfólkið, deildina, depilin og Landssjúkrahúsið sum heild.

**2a) Skipa eina HR- og Menningardeild**
HR-menningarleiðari er settur og HR-deildin skal skipast. Ein lýsing skal gerast av tí, sum HR deildin kann bjóða seg fram til.

**2b) Útbúgving**

*Fyrireika LS-leiðaraútbúgving*
Í ár verður arbeitt víðari við at gera eina LS-leiðaraútbúgving, sum ein arbeiðsbólkur fyrireikaði í 2010. Modulini skulu lýsast og ætlanin er, at fyrsta holdið við umleið 12-16 leiðarum fer undir útbúgving í ár.

*Ætlan og raðfesting av starvsfólkamenning í 2011*
Útbúgvingarnar innan intensiv heldur áfram og apoplexi fer í gongd í 2011. Viðvíkjandi øðrum virksemi, fara menningarsamrøðurnar í 2011 at geva eina ábending um, hvar fakliga menningin skal liggja.

**2c) Menningarsamrøður aftur í 2011**
Uppgávan at verkseta menningarsamrøður á Landssjúkrahúsinum er umfatandi og enn er ikki komið á mál. Menningarsamrøðurnar eru tí settar á sum verkevni í 2011. LS kunnar starvsfólk og undirvísir leiðarum eftir sama leisti sum í fjør. Málið er at fáa allar deildir í gongd og 70 % av starvsfólkunum, sum hava verið í starvi í meira enn eitt ár, koma til samrøðu.

Sum eitt beinleiðis úrslit frá menningarsamrøðunum verða innanhýsis skeið fyriskipað og lýst í faldara og heimabeitið í mun til eftirlýstan tørv. Hesi eru vælumtókt og sømi um eitt átak sum stuðlar undir tilgongdina at halda og at fara í gongd við menningarsamrøðurnar.

Hóast LS enn ikki hevur ognað sær nakra HR-skipan, so verða niðurstøðuskjølini innsavnað, og geva hesi eina vitan, sum eisini kann verða brúkt í einari framtíðar HR-skipan.

**2d) Gransking**

Virksemi innan gransking og áhugin fyri gransking er øktur seinastu árini. Landssjúkrahúsið hevur samband og samstarv við granskingarfelagar bæði innanlands og uttanlands innan ymisk granskingarøkir.

Eisini eigur LS, sum útbúgvingarstað, at hava í huga allar heilsustarvsbólkar, sum sýna áhuga í gransking. Landssjúkrahúsið vil kveikja og stimbra undir størri og minni verkætlanum.
Ein granskingarnevnd á LS er sett og skal fáast at virka í næstum. Ein bólkur, sum skal mannast av viðkomandi starvsfólkum frá LS, skal hava til uppgávu at vegleiða og stuðla undir granskingarætlanir á LS, og býta út innanhýsis granskingarstuðul. Innanhýsis granskingarstuðul verður mettur at kunna hava avgerandi týdning fyri at fáa forkanningar v.m. í gongd, sum aftur kunnu gerast til størri verkætlanir. LS er farið undir at orða eina granskingarstrategi, og verður hesin partur av virkseminum hjá Granskingarnevndini.

LS kannar, um grundarlag er fyri einum samstarvi við aðrar granskingarstovnar, har stovnarnir hava eitt samstarv um brúk av ymsum granskingartólum, og á henda hátt viðvirka til økt felags gagn og framburð.

LS skipar E2 sum eina granskingar- og menningarlon, sum skal hýsa bæði innanhýsis og uttanhýsis samstarv við eitt nú Fróðskaparsetrið, Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu og Ílegusavnið.

Málið er at fáa PhD lesandi í somatikkini í 2011, hetta er rokkið, málið er at fáa ein PhD lesandi aftrat í somatikkini í 2012.

| Ávirkskrøv: Førleikamenning | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | Leiðslu og starvsfólkamenning | |
| Virksemi | a)Skipa deild<br>Definera HR og HR ábyrgd á depils- og deildarstig<br>b)Lýsa tørvin og byrja at leggja yvirskipaða ætlan fyri førleikamenning<br>b)LS-útbúgving<br>- herundir leiðaraskeið<br>c) Menningarsamrøður. Eftirmeting 2010. Seta mál fyri 2011.<br>d)Granskingarsamstarv<br>Orða granskingarpolitikk | 2011<br>2011/12<br><br><br>2011<br><br><br>2011 |

# 3. Betri samskifti innanhýsis og úteftir

## 3a) Styrkja samskiftið við borgaran

Samskifti og kunning til sjúkling er týðandi partur í 'tí góðu sjúklingagondini'. Arbeiðsgongdir og kunnandi tilfar er framleitt í hesum sambandi, og skal hetta sjónliggerast og breiðast út á heimasíðuni – bæði innanhýsis og uttanhýsis. Eisini annað viðkomandi tilfar til sjúklingar og avvarðandi eigur at verða dagført og talgildað.
Endamálið við heimasíðuni er at menna nýggjar samskiftistænastur og økja um kunningarstøðið, so at sjúklingar, avvarðandi og aðrir borgarar fáa dagførda kunning um tænastuna, sum LS veitir. Viðvíkjandi tøkniligu menningini, sum stuðlar undir hesa samskiftistænastu verður víst til punkt 4.

## 3b) Styrkja samskifti innanhýsis

Málið er at arbeiða meira miðvíst við at styrkja samskifti innanhýsis. Verkætlanir, sum eru tvørfakligar og sum ganga tvørturum deplarnar, hevur eisini víst seg at bøta munandi um samstarvið. Eitt dømi er THS og arbeiðið við sjúklingagongdum.

Samstundis sum THS er verksett, hevur organisatiónin eisini flutt seg, tí fleiri hava atgongd til teldu og hava m.a. fingið egna teldupostadressu og kunnu lesa teldupost heimanífrá.
Orka verður løgd í at dagføra heimabeitið og heimasíðuna. Á heimasíðuni er málið at fáa meira talgilt kunningartilfar út og á intranetinum verður arbeitt við at menna eina innanhýsis leiðaraportal í sharepoint, har leypandi dagførd tøl um m.a fíggjarstýring og sjúkrafráveru og annað viðkomandi tilfar er tøkt á leiðaraniveau. Hesin platformur stuðlar undir felags fatan og nýggir møguleikar at samskifta uppá.

Leiðslan vil fáa Samstarvsnevndina og Trygdarnevndina í størri mun við í arbeiðið at stimbra um og menna samstarvið. M.a. hevur Samstarvsnevndin og Trygdarnevndin víst áhuga í at gera eina 'arbejdspladsvurdering' – APV-metan, sum serliga metir um fysiska og psykiska arbeiðsumhvørvið. Ætlanin er at fáa tøl til vega, soleiðis at tað gerst sjónligt og kann staðfestast, hvar ábøtur eiga at gerast.
Málið er alsamt meira búnað, og ynski er framhaldandi at taka stig til eina APV, har arbeiðið kann byrja í 2011.

## 3c) Styrkja uttanhýsis samstarvið - Dialogfundir við kommunulæknar

Í oktober í 2009 varð tikið stig til dialogfundir millum serlæknar og kommunulæknar. Hetta er eitt samstarvsforum, sum læknar taka væl undir við, og sum kann vera við til at loysa samskiftistrupulleikar og eitt forum, har kunnað verður um viðurskifti, sum hava felags áhuga. Ikki minst, tá hugsað verður um, at kommunulæknar hava ein týðandi leiklut í mun til at bøta um sjúklingagongdirnar.
Nú tær seks sjúklingagongdirnar í 2010 skulu verksetast, verður tíðin mett at verða búgvin til at taka sjúklingagongdirnar upp við kommunulæknarnar og aðrar partar uttanfyri LS, sum eiga týðandi part av sjúklingagongdunum. Ein temadagur við serfrøðingini í optimering av sjúklingagongdum er planlagdur í februar.

4 dialogfundir/evnisfundir vóru hildnir í 2010 og ætlar LS at halda áfram við hesum í 2011.
Eisini verður skipað fyri einum evnisdegi fyri kommunulæknar og serlæknar, har endamálið er at styrkja samstarvið partanna millum.

| Avrikskrøv: Samskiftið eitt virkið amboð | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | Betri samskifti innanhýsis og uttanhýsis | Tal av teldupostadrs! |

| | | |
|---|---|---|
| | gevur betri sjúklingargongdir | |
| Virksemi | 3a)Betra samskiftið við sjúklingar, avvarðandi og aðrar borgarar<br>3b) Byrja at fyrireika APV saman við samstarvs- og trygdarnevnd<br>3c) 4 dialogfundir /evnisdagar fyri serlæknar og kommunulæknar | 2011<br><br><br><br>2011 |

# 4. Betri KT

**4a)Fokus á KT-trygd**

THS-skipanin og aðrar KT-skipanir á LS seta stór krøv til KT-trygdina. Enn meira fokus skal setast á at tryggja, at persónsupplýsingar verða vardir, samstundis sum hesir eru tøkir á rætta stað. Hetta er ein stór avbjóðing. Arbeiðsgongdir skulu gerast, og fólk er sett burturav at taka sær av KT-trygdini, herundir at orða ein KT-politikk.

**4b) THS-konsolidering**

Hóast øll THS skipanin er verksett á LS, so er enn ikki komið á mál. LS og HMR hava brúk fyri einari konsolideringsrundu í 2011, tí skeivt brúk av THS-skipani avspegla skeiv hagtøl. Málið má verða, at heilsustarvsfólk kenna seg tryggan at brúka skipanina, og tí er undirvísing/upplæring av resursupersónum ein uppgáva sum HMR og LS skulu lifta í felag. Í hesi fasu skal skipanin tillagast og THS brúkarar fáa undirvísing. M.a. skal undirvísing í sjúklingafyrisiting raðfestast í ár og m.a. læknaskrivarar skulu fáa upplæring at skráseta rætt. Hetta arbeiði skal gerast í tøttum samstarvi við HMR, tí LS brúkarar ikki síggja um skipanin verður nýtt á rættan hátt. Ein máti er at fáa tilevna og lagt rapportir út á Heimabeitið.

**4c) MADS mikrobiologisk skipan**

Skipanin er keypt og málið er at fáa hesa verksetta og er hetta ein partur av THS-skipanini.

**4d)Patologiskipan**

Fyrireikingar til eina talgilda patologiskipan skulu gerast í 2011.

**4e) Uppstigningar og fleiri skipanir í THS**

Alsamt fleiri upplýsingar verða talgildar. THS verður liðugt verksett í Psykiatriska deplinum til várs. Digitala dikteringin varð ikki sum ætlað verksett í 2010, og arbeitt verður við at fáa hetta verksett í 2011. Hetta merkir at dikteringar, sum ikki eru skrivaðar inn í THS, liggja knýttar sum ljóðfílar í THS-skipanini.

SMS-boðtænastan, sum hevur til endamáls at betra tænastuna mótvegis sjúklinginum, verður royndarkoyrd. Hetta hevur við sær, at sjúklingurin verður mintur á gjørdar avtalur umvegis sms-skipanina, um sjúklingurin hevur givið fartelefonnummarið til t.d. eitt ambulatorium. Skipanin virkar og verður royndarkoyrd. Tillagingar og THS-undirvísing skal til áðrenn skipanin kann breiðast út á fleiri ambulatorium. Ætlanin er at hetta skal gerast í ár.

Tekniskt verður í ár eisini uppstigað frá Office2003 til 2010 og gamla Doculive, skjalaskrásetingarskipanin frá 1998 verður avloyst við 360. Hetta førir við sær betri samskifti og betri møguleikar fyri at skipanir kunnu tosa saman.

Í november 2010 varð farið undir at menna ein innanhýsis leiðaraportal (LIS) og verður hesin mentur og vístur í sharepoint.

| Avrikskrøv: Betri KT-trygd og álsamt fleiri upplýsingar | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | KT stuðlar virkseminum | |
| Virksemi | a) Fokus á KT-trygd<br>b) THS konsolidering<br>c) MADS mikrobiologisk skipan<br>d) Patologiskipan<br>e) Uppstigingar og fleiri skipanir í THS | 2011/12<br>2011<br>2011/12<br>2011/12<br>2011 |

## 5. Fleiri og betri hagtøl

Landssjúkrahúsið framleiðir heilsutænastur av øllum møguligum slagi til borgaran. Talan er um alt frá samrøðum og smærri kanningum til samansettar skurðviðgerðir. Higartil, hevur ikki borið til at útgreina virksemið, ella framleiðsluna, á Landssjúkrahúsinum í størri mun. Íverksetanin av THS-skipanini hevur tí stórar møguleikar við sær í hesum sambandi. Enn er tað, sum fæst úr THS-skipanini, at meta sum verandi á einum byrjunarstigi, men Landssjúkrahúsið hevur í 2010 og framhaldandi í 2011 sett orku av til at fáa til vega leypandi virksemishagtøl sum eitt leiðslu- og stýringsamboð. Arbeiðið skal gerast í tøttum samstarvi við HMR og enn er langt mál. Rapportir skulu gerast og í tøttum samstarvi við LS, skulu hesar breiðast út til viðkomandi deplar og deildarniveau. Tá ber til at arbeiða við fáa afturmelding um tøl eru røtt ella skeiv.

Í endanum av 2010 var gongd sett á hetta arbeiði og síðani støðugt at menna hagtalstilfarið komandi árini. Ein leiðskumenningarsíða verður ment í Share-point og sum ger tað møguligt at fáa víst viðkomandi hagtøl á depils og deildarniveau.

Í mál og avrikssáttmálanum fyri 2012 skulu fleiri og neyvari hagtøl fyriliggja fyri virksemisuppgerðir sum partur av sáttmálanum.

Hetta fer at gera tað møguligt frameftir at fáa eitt betri samband millum fíggjarstýring og virksemi.

| Avrikskrøv: Tilfeingi brúkast munagott | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | Betri stýring og ráðlegging | |
| Virksemi | a) Fáa til vega, neyv og álítandi hagtøl úr THS/CI | 2011 |
| | b) Fáa til vega fleiri og betri fyristingarlig hagtøl | 2011 |

| | | |
|---|---|---|
| | c) Treytað av a) og b), fáa til vega betri samband millum virksemi og fíggjarstýring. | 2011/12 |

**Sáttmálaskeið og frágreiðingar**

Sáttmálin er galdandi fyri 2011.

Eftirmeting verður gjørd í heyst. Uppfylgjandi fundir eiga at verða millum Heilsumálaráðið og Landssjúkrahúsið, sum fylgja verkevnunum upp, har Heilsumálaráðið eisini leggur sítt íkast.

Í 2011, sum er triðja árið á rað, verður sáttmálin endurskoðaður í heyst og síðani aftur fyrst í januar 2012.

Verða fortreytirnar munandi broyttar, eftir tað at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, eru partarnar samdir um tað.

Tórshavn, tann 7/4 - 2011

| Landssjúkrahúsið | Heilsumálaráðið |
|---|---|
| Sigurð Ó Vang, sjúkrahússtjóri | Poul Geert Hansen, aðalstjóri |